# Takk fyri áhaldandi stríð í fremstu røð



Føðingardagsbarnið í góðum og kendum umhvørvi

**– Hann hevur nógvar eginleikar, men í hansara persónsmensku eru eisini nógvir mótsetningar, segði Jóannes Eidesgaard í heilsan síni til Atla Dam í føðingardagsveitsluni herfyri**

FØÐINGARDAGUR
*Myndir: Leivur Nygaard*

– Trúgvur sum trøllið og í øllum lutum ein góður kammiratur.

Soleiðis er Atli Dam, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins.

Tá ið fyrrverandi løgmaður, Atli Dam helt 70 ára føðingardag i Trongisvági heryfri, var formaður javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard sjálvskrivaður røðari.

Eini 220 fólk høvdu leitað sær inn í høllina í Trongisvági í føðingardag at heiðra fyrrverandi stórpolitikaran, tey flestu úr Suðuroy, men annars gestir úr øllum landinum og tey siga sum við ein munn, at hetta var ein veitsla av teimum allarbestu.

Tað var fallið Onnu Kirsten Steinø í lut at halda skil á borðhaldinum og tað, fyrsta, hon gjørdi, var at avmarka talitíðina til tríggjar minuttir - og tað mundi koma væl við, tí ikki færri enn 21 røðarar nýttu høvi til at heilsa Atla við røðu ímeðan borðhaldið var.

Umframt Jóannes Eidesgaard, vóru tey, sum hildu røðu, hesi: Vilhelm Johannesen, Jógvan Adolf Johannessen, Henrik Old, Sverri Midjord, Knút Nolsøe, Óli Heinesen, Tummas Michael Smith, Heri Niclasen, Sigdrid Witt, Heri Smith, Anna Dam, Hans Jørgensen, Signar Dam, Ketty Andreasen, John Johannesen, Hilmar Bech, Sólbjørn Jacobsen, Jákup Lindenskov, Torgerð Suðuroy og Manne Næs.

Eina serliga heilsan fekk Atli Dam frá Betty Niclasen, vanliga nevnd Betty hjá Rudolf, sum sang tveir gamlar, danskar sangir, sum tey plagdu at syngja fyrr og tað gjørdfi hon so yndisliga, at tað vóru nógvir vátir eygnakrókar við borðini.

### Áhaldandi stríð í fremstu røð

Í røðu síni takkaði Jóannes Eidesgaard javnaðarfloksins vegna, Atla fyri fyri virki og áhaldandi stríð í fremstu røð, har grundstøðið altíð var okkara ynski um eitt vælvirkandi samfelag fyri allar føroyingar, uttan mun til fíggjarligar, sosialar, likamligar ella sálarligar fortreytir.

Fyri tingmanningina hjá javnaðarflokkinum, takkaði hann eisini Atla Dam fyri tær rásir hann hevur slóðað fyri tey, sum gingu ein part av leiðini saman við honum og fyri tey, sum aftaná koma.

Fyri seg sjálvan og konuna Anitu, takkaði hann Atla fyri gott vinalag, umsorgan og umhugsni.

– Trúgvur sum trøllið og í øllum lutum ein góður kammiratur

Jóannes Eidesgaard segði, at tá ið hann legði frá sær sum virkin politikari eftir 23 virkin árum - tey flestu sum løgmaður, var tað meðan alt landið lá í andaleypi og fíggjarligu óløgini skolaðu inn yvir okkum.

– Ta tíðina lógu lýsingaorðini ikki fremst á tungu, men nú, vit hava fótað okkum aftur, kunnu vit siga tað, sum ikki varð sagt tá:

Tað, han sipaði til, var at nevna nakrar eginleikar, sum Atli Dam hevði sum politikari.

– Hann var arbeiðssamur, gløggur, smidligur, semjusøkjandi, kraftmikil, álitisskapandi og víðskygdur.

– Men samstundis goymir hann meiri enn vanligt er, eisini mótsetningarnar.

Tí Atli Dam hevur eisini tyngd, men kortini er hann lítillátin, hann er framtúrandi, men eisini varin, hann er harður, men eisini bleytur, hann er snarsintur, men tó tolin og hann er kraftmikil, men eisini mildur, segði Jóannes Eidesgaard.



*Eisini unga ættarliðið hugnaði og stuttleikaði sær óført á føðingardagsveitsluni*



*Nógvir góðir og trúgvir vinir heilsaðu Atla á føðingardagsveitsluni*



*Virðiligir og góðir vertir bjóða oyggjarfólki og avbygdarfólki vælkomin á veitsluna í høllini*



*Trúgv sum trøllið er hon Jona og kennir altíð sína vitjunartíð, tá tað ræður um góðar og trúgvar vinir og floksfelagar*



*Formanshjúnini settu eisini sín góða dám 70 ára føðingardagsveitsluna hjá fyrrverandi formanninum*



*Tað hevur altíð verið vítt til veggja og høgt til loftið, har Atli Dam hevur búleikast. Millum mongu gestirnar fyrrverandi sýslumanshjúnini*



# 11. september gav okkum møguleikan

**Atlantsflog og Air Greenland hava fingið hølini, sum Swiss Air hevði í floghavnini í Kastrup**

SAMFERÐSLA
Eirikur Lindenskov



*Stjórarnir í føroyska og grønlendska flogfelagnum klippa snórin til nýggju avgreiðsluna – Tað snýr seg um at taka kjansin, tá hann er har*

*Mynd : Eirikur Lindenskov*

**Kastrup:** Hetta sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, sum í gjár lat upp nýggja avgreiðslu í Terminal 2 Kastrup Lufthavn.

Atlantsflog hevur latið upp avgreiðsluna í samstarvið Air Geenland. Bæði feløgini vórðu framman undan umboðað við skrivstovum í altjóða floghavnini í Kastrup, men ikki niðri í sjálvari komu- og fráfaringarhøllini.

Tað var í veruleikanum atsóknin at World Trade Center 11. september í fjør, sum er óbeinleiðis orsøkin til, at Atlantsflog nú fekk hendan møguleikan.

Frammanundan var tað Qualiflyer Group, sum var ein partur av Swiss Air, sum hevði til húsa í hesum hølum, men Swiss Air mátti sum kunnugt lúta fyri minknandi ferðafólkatalinum, sum var ein avleiðing av 11. september 2001, og fór á húsagang.

Magni Arge er týðuliga fegin um, at avgreiðslan hjá Atlantsflogi nú er eins týðulig í stóru donsku floghavnini, sum British Airways og Air France.

- Tað er ein stórur fyrimunur hjá okkum at hava avgreiðslu og skrivstovu okkara her á »gólvinum«, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi.

Hann sigur, at tey nú betur fáa fylgt ferðafólkinum, frá tí, at tað kemur í floghavnina í Vágum, til tað fer úr floghavnini í Kastrup og øvugt.

– Vit hava eisini økt fráferðirnar á vetri til nýggju – frammanundan vóru tær sjey. Vit hava lagt eina fráferð afturat hóskvøld og eina afturat sunnukvøld, eins og flogið verður heim til Føroya ávikavíst fríggja- og mánamorgun.

Júst flogleiðin millum Vágar og Keypmannahavn er tann stóra leiðin hjá Atlantsflogi, og eigur føroyska flogfelagið um 60% av ferðafólkatalinum á hesi leiðini.

Tað ganga nógv fólk framvið avgreiðsluni hjá Atlantsflogi í Terminal 2, og hetta hevur sjálvandi verið ein av orsøkiunum til, at felagið valdi hesi hølini.

– Vit hava ikki størri rakstrarútreiðslur av hesi avgreiðsluni, enn vit høvdu framman undan av skrivstovuni, sum vit høvdu á aðru hætt, av tí at vit gera hetta í felag við Air Greenland, sigur Magni Arge.

Grønlendska flogfelagið hevur eina lutvíst nógv størri skrivstovu í Kastrup, so tey hava bara flutt tvey fólk níður í avgreiðsluna til at avgreiða ferðafólk. Atlantsflog hevur flutt alt sítt virksemið í avgreiðslun, t.v.s., at har starvast fýra fólk.

